

*Ógvusligt sær tað út*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Bátar fingu skaða í Kvívík

**Leygarmorgunin var sannur uppgangur í Kvívík.**

**Inni í bátahylinum vóru einir tveir bátar koppaðir, og fyrrapartin henda dagin royndu menn at fáa teir inn á land, so at teir ikki skuldu gera størri skaða. Løtu seinni fingu teir báðar bátarnar upp á land.**

**Tað sjáldsama í hesum er, at í grannabygdini Vestmanna var fínasta veður. Hetta hóskaði væl til stóra tiltakið – Bátastevnuna – sum varð hildin har um vikuskiftið.**

**sb.**



*Teir royna at fáa holvda bátin inn á land*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## STUTT SAGT

## Hægri inntøkur í Klaksvík

**Klaksvík:** Skattainntøkan hjá Klaksvíkar kommunu var omanfyri 10 mió krónur í apríl mánaði. Hetta eru góðar 0,8 mió meiri enn í apríl 2006.

Inntøkurnar higartil í ár eru 40,7 mió kr., sum gevur eina meirinntøku upp á sløk 8 % í mun til sama tíðarskeið í fjør.

Saman við reguleringum av persóns- og partafelagsskatti fyri farin ár, er samlaða skattainntøkan fyri apríl 10.118.576 mió krónur.

- Í fíggjarætlanini fyri 2007 eru inntøkurnar mettar til 127 mill. kr.. Verða tær eins góðar og higartil, kunnu vit rokna við, at skattainntøkurnar verða 10 mió kr. størri ella 137 mió kr., sigur Klaksvíkar kommuna.



Íløgutørvurin í kommununi er hinvegin stórur og væntaða økingin fer óivað at koma væl við, tí nógvar stórar verkætlanir liggja og bíða.

## Nýggja vøggustovu um eitt ár

**Sandavágur:** Samstundis sum fleiri sethús verða bygd, er tørvurin á ansingarplássum eisini vaksin. Og hetta hevur kommunan nú tikið fylgjurnar av.

Herfyri byrjaði arbeiðið uppá vøggustovuna, har pláss íalt skal verða fyri 30 børnum. Vøggustovan verður 260 fermetrar til støddar. Ætlanin er at hon skal verða liðug um eitt ár.

## Brandskeið fyri alla bygdina

**Selatrað:** Tað er ikki á hvørjum degi at alt bygdarfólkið sleppur á brandskeið. Hetta er kortini tað sum Skálafjarðar Sløkkilið tekur stig til leygardagin 26. mai.

Henda dagin fáa øll á Selatrað møguleika at fáa størri kunnleika um eld og eldsløkking, og síðani sleppa tey bæði at sløkkja eld við brandteppi og við eldsløkkjara.

Skeiðið, sum er ætlað bæði ungum og gomlum, varir í einar tveir tímar. Hetta er ein partur av tí fyribyrgjandi arbeiðinum hjá sløkkiliðinum og ein liður í tilbúgving teirra.

Skálafjarðar Sløkkilið er sløkkilið hjá Nes, Sjóvar, Runavíkar og Funnings kommunum.